gult cyan magenta svart
gult cyan magenta svart

DAGSINS MEINING

Kann gerast eitt d‡rt prinsipp!

Dagurin í dag ver›ur sambært tí, sum er frætt, ein avgerandi dagur hjá P.f. Smyril Line, tí umbo› fyri felagi› skulu í dag tosa vi› t‡sku skipasmi›juna, sum skal smí›a ta› n‡gja skipi› hjá felagnum. Fríggjadagin í sí›stu viku var› greitt, at felagi› megna›i ikki at útvega tann kapital, sum skipasmi›jan í Flensburg hevur kravt fyri aftur at fáa álit á føroyska skipafelagnum.

Ta› var neyvan væntandi, at landsst‡ri› fór at veita ve›hald fyri einum láni, sum var 30 milliónir krónur til støddar. Hetta láni› skulu felagi› sjálvt taka í eini loysn saman vi› Framtaksgrunninum og eini ætlan at tekna meiri partapening. Frammanundan høvdu Tryggingarfelagi› Føroyar og Føroya Lívstrygging avgjørt ikki at seta 25 milliónir í hvør. Umframt tryggingarnar skuldi Framtaksgrunnurin koma vi› 25 milliónum. Vi› ø›rum or›um eydna›ist ta› ikki P.f. Smyril Line at útvega tær 75 milliónirnar, sum helst skulu til sambært krøvunum frá skipamsi›juni, og tí tykist lagnan hjá felagnum at vera heldur ógrei›.

Flestu føroyingar hvukku óiva› vi›, tá ta› fyri eini viku sí›ani ljó›a›i, at ta› stó› ikki so væl til hjá P.f. Smyril Line. Vanlig hugsan millum manna var annars, at Smyril Line var rættiliga væl fyri fíggjarliga, tí felagi› hevur havt avlop í fleiri ár. Nógvir føroyingar munnu harafturat halda nú - eftir at gongdin er l‡st - at ta› er løgi›, at tey sterku tryggingarfelagini ikki kunnu seta 25 milliónir krónur í partapeningi, tí hvørt felagi› hevur vir›i, sum liggja væl oman fyri milliardina.

At landsst‡ri› fór at siga nei var væntandi, tí landsst‡ri› hevur fer› eftir fer› sagt, at tær fríu markna›arkreftirnar skulu rá›a. Velur landsst‡ri› henda politikkin, so má hann eisini galda fyri øll onnur feløg. Ta› er rætt at seta sær mál og leggja ein ávísan politikk, men vi›hvørt kann ein so avgjørdur politikkur eisini hava óhepnar avlei›ingar.

Ein av orsøkunum til ringu stø›una hjá Smyril Line vóru teir høgu oljuprísirnir. Kann ta› hugsast, at Atlantsflog eisini kemur í eina óhepna stø›u av teimum høgu oljuprísunum? Avkasti› frá flúgvingini er líti› og einki, og fekk felagi› ikki nakrar milliónir burtur úr tollfríu søluni, hev›i úrsliti› fyri í ár neyvan veri› røttu megin null. Skal sama politiska linja haldast, skal landsst‡ri› heldur ikki uppí, um ney›ugt ver›ur hjá Atlantsflog at útvega pening ella ve›hald! Í øllum førum, um prinsippi› hjá landsst‡rinum skal galda!!!

Ta› er kanska ein hypotetiskur spurningurin, men hev›i ta› veri› samfelagsliga rætt at lati› Atlantsflog fari›? Avlei›ingin hev›i helst veri›, at vit aftur fingu danskt monopol! Flúgvimonopolit› var d‡rt! Og prinsippi› hjá borgarliga landsst‡rinum kann tí eisini gerast d‡rt fyri føroysku tjó›ina tá avtornar. Vi› hesum er avgjørt ikki sagt, at ta› almenna eigur at veita eitt ve›hald fyri 30 milliónir. Til tess er máli› ikki nóg væl uppl‡st. Harafturat eigur spurnartekin at setast, hvussu bur›ardygg verkætlanin - ein ferja fyri 650 milliónir - er, tá oljuprísurin og okkurt anna› nosi› kom hana í vanda.

NØVN Í VIKUNI



Maskinmeistarin givin

Seinasti maskinmeistarin á Rey›a Krossi, Christian Reinert Petersen, sum seinnu árini hevur arbeitt á Landssjúkrahúsinum, gavst í heyst, tá hann gjørdist 67 ára gamal.

Christian er ætta›ur úr Saltnesi og fór hálvvaksin til Havnar í smi›julæru hjá Hans M. Reinert. Men ta› var skjótt, at meistarin sendi hann til Danmarkar at læra ví›ari vi› teirri grundgeving, at har kundi hann fáa meira burturúr.

Eftir at Chrsitian hev›i loki› sveinaroyndina, arbeiddi hann nøkur ár í Danmark, á›renn hann fór til skips sum maskinmeistari á ymsum fiskiskipum.

Tá hann gavst at sigla, fór Christian at arbei›a á Tórshavnar Skipasmi›ju, til hann í sekstiárunum saman vi› ø›rum keypti Vestmanna Skipasmi›ju.

Á Vestmanna Skipasmi›ju vór›u tr‡ línuskip smí›a› tey árini, Christian var ein av eigarunum. Tey vóru Stapin, Thomas Nygaard og Sundaenni, sum nú eitur Eysturoyingur.

Christian gjørdist seinni maskinmeistari á Rey›a Krossi, har hann var, til skipi› var› lagt. Tá fór Christian at arbei›a á verksta›num á Landssjúkrahúsinum, ha›ani hann nú er farin vegna aldur.

Christian er sera fittur í hondunum og putlast nógv vi› ymiskar pr‡›islutir. Telgir og sagar og ger vi›.

Annars dámar Christiani væl at lesa og syngja. Hevur veri› kórsangari í fleiri ár. Millum anna› í Kristiliga Sangkórinum og Tórshavnar Manskóri.

Frítí›ina dámdi honum væl at brúka í summarhúsinum i Leynum. Og nú hann er givin at arbei›a, er frítí›in nógv, og ta› far summarhúsi› kanska at kenna.



Málma›ur sømdargávu Chr. Matras

Hóskvøldi› fekk Jeffrei Henriksen, málma›ur og fyrrverandi lærari í Havn, sømdargávu Kristjans á Brekkumørk.

Sømdargáva Kristians á Brekkumørk er upp á 15.000 krónur, og hon ver›ur latin fólki fyri at sty›ja verki einstaklinga føroyskum máli› at frama.

Ta› Jógvan í Lon Jacobsen, sum handa›i Jeffrei sømdargávuna á samkomu í Nor›urlandahúsinum hóskvøldi› - 100 ára dagin hjá Christiani Matras. Hann seg›i, at sømdargávan var› latin Jeffrei Henriksen fyri langt og drúgvt starv fyri føroyska málinum.

Jeffrei Henriksen er føddur í Sørvági 1. mai 1930. Hann er sonur Jóhan Jákup Henriksen úr Gásadali og Josefine f. Johansen úr Sørvági. Hann er giftur vi› Kirstini f. Jensen av Strondum. Jeffrei tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1950 og hevur veri› lærari í Bø og Gásadali 1950-55, á Ei›i 1955-60, í Tórshavnar Kommunuskúla 1960-68, skúlastjóri í Venjingarskúlanum 1968-81 og hevur undirvíst á Føroya Lærarskúla 1968-95, lektari frá 1981-95, tá i› hann fór úr starvi.

Jeffrei Henriksen var eina tí› limur í Tórshavnar Skúlará›. Limur í Málnevndini. Byrja›i brævskúla í føroyskum í 1956. Var vi› at stovna Skúlabókafelagi› í 1963 og hevur lagt føroysku leisbøkurnar til rættis.

Jeffrei Henriksen fekk M. A. Jacobsens vir›isløn fyri yrkisbókmentir í 1977.

Landsst‡riskvinna 45

Sunnudagin fylti Helena Dam á Neystabø, landsst‡riskvinna í heilsu- og almannamálum 45 ár. Helena er dóttir Atla Dam, fyrrverandi løgmann og Ásu Hátún.

Hon er gift vi› Kristiani á Neystabø, sum er sonur Katrinu og Napoleon á Neystabø.

Hon er útbúgvin Cand. mag. og hevur starvast sum studentaskúlalærari árini 1983-85. Hon var fulltrúi á Landsskúlafyrisitingini árini 1985-87. Hon hevur starvast á Skúlabókagrunninum sí›aini 1988, og sum dagligur lei›ari frá 1990.

Helena Dam á Neystabø var› vald á ting fyri Sjálvst‡risflokkin í november 1990. Hon tók øll á bóli, tá hon brádliga lat seg stilla upp á listanum hjá Sjálvst‡risflokkin, eftir at hava veri› limur í Javna›arflokkinum í mong ár, har hon eisini hev›i onkur álitisstørv. Í mai 1993 gjørdist Helena forma›ur í tingbólkinum hjá Sjálvst‡risflokkinum

Av politiskum álitisstørvum annars er at nevna, at hon var forma›ur í rættarnevnd løgtingsins mai 1993 - juli 1994. Limur í markna›arnevnd løgtingsins sí›an mai 1993, forma›ur 1994-95. Forma›ur í løgtingsins uttanlandsnevnd juli 1995 - 98. Limur í Tingmannará›i Útnor›urs 1990-1998.

Løgtingsma›ur: 1990 - 1998. Landsst‡risma›ur: Sí›an mai 1998.

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, i› mintust okkum í stóru sorg okkara, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

Dania Johansen
Mi›vági

doy›i og var› jar›a›.
Tøkk til tykkum, i› vóru um hana seinastu tí›ina, og tykkum, i› trúliga vitja›u hana, tá hon lá sjúk. Fyri troystarrík or› í heimi og kirkju.
Til sangarar, kirkjutænarar og gravarar. Tøkk fyri stóru hjálpina vi› jar›arfer›ina. Fyri blómur, kransar og peningagávur. Tøkk tit mongu, i› fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarsta› her á fold.

Vegna familjuna
Hannvør, Dánial og Erik

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.